## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 3. nov. 2006, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur gjørt ískoyti til umhvørvisgóðkenning hjá:

**P/F Faroe Marine Products í Leirvík**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

# Søkt verður eftir lærara

at undirvísa frá ársbyrjan og skúlaárið út.

Annar umsøkjari kann verða settur, um ongin annar skikkaður umsøkjari er.

Eitt starv er at byrja 1. januar 2007 fulla tíð við hesi tímatalvu:

8. flokk
- støddfrøði
- danskt
- landalæra

6. flokk
- føroyskt

7. flokk
- ítrótt og stuðulstímar.

Annað starv at byrja áleið 22. januar 2007 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi, fulla tíð við hesi tímatalvu:

2. flokk
- støddfrøði
- kristni
- evning

6. flokk
- støddfrøði
- enskt
- ítrótt og stuðulstímar

**Lønar og setanartreytir:**
Annar umsøkjari kann verða settur um ongin annar skikkaður umsøkjari er.

Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so er, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið er lønt í lønarflokki 18.1-27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Umsóknir við lívsrensli og avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **mikudagin 22. november.**

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til **Marjun Holm**, skúlastjóra, á tlf. 302510 og 221466 ella **Bjørg A. Poulsen**, varaskúlastjóra á tlf. 302510 og 518440.

Eisini ber til at senda teldupost til skúlan argskuli@post.olivant.fo

Tvøroyrar Kommuna

**Suðuroyar Barnaverndartænasta**
www.tvoroyri • susanne@tvoroyri.fo • tlf. 371085 • fax 371814 • postboks 80 • FO 800 Tvøroyri

# Pedagogiskur ráðgevi/samskipari til Barnaverndartænastuna í Suðuroy at seta skjótast gjørligt

Kundi tú hugsað tær at virka og arbeitt fyri, at børn og ung í Suðuroy fáa tryggleika, umsorgan og ein tryggan uppvøkstur? So átti tú tá at umhugsa at søkt arbeiði á Barnaverndartænastuni í Suðuroy.

Á barnaverndartænastuni í Suðuroy hava vit brúk fyri einum fólki í hálvtíðarstarvi (20-25 t/v), sum skal hjálpa okkum at bøta um umstøður og kor hjá teimum, sum ikki hava nóg mennandi og tryggan barn- og ungdóm.

Barnaverndartænastan sum bjóðar tænastu til borgarar í øllum kommunum í Suðuroy, húsast í løtuni í býráðshúsinum á Tvøroyri har 2 fólk arbeiða. Arbeiði, sum er ógvuliga fjølbroytt umfatar m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og ráðgeva stuðlar, sum skulu hjálpa og menna barnið í og uttanfyri heimið. Í arbeiðinum fert tú eisini at samstarva við nógvar fakbólkar m.a. innan námsfrøði, sálarfrøði og innan undirvísingarøki. Tú kemur at taka tær av nógvum ymiskum barnaverndarmálum – gomlum sum nýggjum - og virkisøkið okkara verður innan karmarnar av barnaverndarlógini.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur hóskandi útbúgving (t.d. pedagog, sosialpedagog, lærari, serlærari)
- at tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiði tínum
- at tú hevur gott innlit og evnar at síggja álvaran í teimum málum tú arbeiðir við
- at tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi

Innlit í og royndir frá barnaverndararbeiði/arbeiði við børn og/ella familjuráðgeving kann vera ein fyrimunur, men er ikki eitt krav.

Tann sum verður settur, fær møguleika at fáa ta útbúgving/eftirútbúgving íð skal til. Hetta kann viðføra at tú m.a. skalt til Danmarkar nakar ferðir.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði
- møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar
- møguleika fyri flekstíð og fyri sjálvtøðugari at tilrættisleggja tínar arbeiðstíðir

Setanarviðurskifti eftir sáttmála við avvarandi fakfelag.

Meira fæst at vita frá Susanne Madsen á tlf: 371085 ella teldupost: susanne@tvoroyri.fo

Umsókn við relevantum prógvum kunnu sendast til

**Tvøroyrar kommuna**
Postboks 80
FO 800 Tvøroyri
Mrk.: starv barnaverndarumsitingin.

Freistin at søkja er: mánadagin t. 20/11-06.

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá TB verður í Felagshúsinum, sunnudagin 19. november kl. 16.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Tvøroyrar Bóltfelag**

## Reingerðis-hjálp

Reingerðishjálp søkist.

**Advokatgarðurin**
Tlf. 311744

FAROE LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosi vi :

**Eyðfinn Jacobsen** advokat

**Jens Wang** advokatfulltrúa

Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FI-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo

Sosialurin

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við